

www.oljan.fo

**Jan Müller** 16 - 06 - 2012

# Oljuverkfall av - føroyingar aftur til arbeiðis

Fleiri føroyingar hava verið raktir av verkfallinum, sum verið hevur í norsku oljuvinnuni seinastu dagarnar. Men teir sleppa nú aftur til arbeiðis. Ferð kann nú aftur setast á fleiri av teimum arbeiðsplássunum í norsku oljuvinnuni, sum herfyri vórðu rakt av verkfalli. Teir báðir partarnir OLF og SAFE komu tíðliga í morgun ásamt um eina avtalu, sum ger, at verkfallið hjá stórveitaranum Baker Hughes er av, og oljufólkini kunnu fara aftur til arbeiðis. Verkfallið, sum hevur kostað 30 mill. kr. um dagin rakti fleiri oljupallar, sum vóru noyddir at steðga virkseminum. Teirra millum var m.a. boring á Cooper leitimiðinum, sum føroyska oljufelagið Faroe Petroleum er partur av. Nú verður tann boringin tikin uppaftur. Verkfallið rakti eisini fleiri føroyingar, sum arbeiða hjá Baker Hughes. Teir kunnu nú fara aftur til arbeiðis. Mynd Ein av føroysku oljuarbeiðarunum hjá Baker Hughes, Kenneth Jacobsen úr Havn, sum nú sleppur aftur til arbeiðis.